# Arbeiðseftirlitið kannar byggipláss

ÁTAK
*Tíðindaskriv*

Frá oktober til desember 2001 kannaði Arbeiðseftirlitið umleið 40 virkir og arbeiðspláss runt um í Føroyum.

Endamálið við kanningini var at kannað eftir um hjálmar blivu brúktir, har hetta er krav sambært reglum eftir arbeiðsumhvørvislógini.

Av hesum kannaðu arbeiðsplássum blivu eini 27 mál send til Fútan, við áheitan um at reisa ákæru fyri brot á galdandi reglur.

Smbrt. kunngerð nr. 136 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss, dagf. 4. sept. 1995, byrjar Arbeiðseftirlitið í mai mánaði eitt átak móti vandanum fyri arbeiðsskaða, tá arbeitt verður høgt uppi, og har vandi er tilstaðar at detta niður.

Tiltøk skulu setast í verk, tá arbeitt verður í hæddini, t.v.s. har fallið er meira enn 2 metur. Har serligur vandi er niðriundir, kann talan verða um minni fall enn 2 metrar.

Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at neyðug tiltøk eru tilstaðar at útføra arbeiðið á tryggan hátt, og tann arbeiðandi skal syrgja fyri, at trygdartiltøkini verða fylgd.

Brot á oman fyri nevndu kunngerð verða beind til Fútan, sum tekur støðu til um ákæra skal reisast. Tann ákærdi kann vænta sær bót, sum Fútin ásetur við sektaruppskoti. Verður bótin ikki goldin, endar málið í rættinum.

# Broytt mannagongd fyri arbeiðs- og uppihaldsloyvir

**– Fyri aðrar vinnur enn oljuvinnuna**

UPPIHALDSLOYVI
*Tíðindaskriv*

Fyri at stytta um avgreiðslutíðina at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi, er gjørd avtala við Udlændingestyrelsen. Arbeiðsgevari, sum ynskir at seta útlending í starv, kann lata inn arbeiðsgevaraváttan til Føroya Landfúta, sum síðani sendir Føroya Landsstýri hana til ummælis.

Ummælið frá Føroya Landsstýri verður um Føroya Landfúta sent til Udlændingestyrelsen. Udlændingestyrelsen, sum móttekur sjálva umsóknina frá ambassadu ella konsuláti, kann so beinanvegin taka avgerð í málinum. Henda avtala broytir ikki ásettu mannagongdum í oljuvinnuni.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg

# Truplar samráðingar

**Alt vikuskiftið hava samgongusamráðingar verið á Gamla Apoteki. Stemningurin hevur verið góður, men nógv er at fáa upp á pláss.**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



*Javnaðarflokkurin var væl mannaður á Gamla Apoteki, meðan samráðingarnar hildu á. Enn er óvist, hvør endin verður á samráðingunum.*

*Mynd: Finnur Justinussen.*

Á Gamla Apoteki hevur alt vikuskiftið verið nógv virksemi. Teir fýra flokkarnir, Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin, samráðast í hesum døgum um at skipa samgongu.

Um úrslit spyrst burturúr, so verður tann nógv umtalaða breiða samgongan til veruleika. Teir fýra flokkarnir eiga í alt 23 av teimum 32 tingmonnunum á Føroya Løgtingið.

Tvey umboð fyri hvønn flokk hava luttikið á fundunum, meðan hini umboðini fyri flokkarnar hava hildið seg tætt hjá.

## Búskapur og blokkur

Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur, at teir sunnudagin hava samráðst um búskaparliga partin og tann ríkisrættarliga partin. Á øðrum økjum eru partarnir komnir rættiliga langt ávegis at finna eina semju.
Anfinn Kallsberg ásannar, at tað er á tí ríkisrættarliga økinum, at partarnir standa longst frá hvørjum øðrum, og hetta hevur eisini merkt samráðingarnar.

Løgmaður boðaði frá, at teir nú høvdu okkurt meira konkret at taka støðu til.

Eftir hvat skilst hevur tað gingið glíðandi við flestu økjunum fyriuttan búskaparliga partin og ríkisrættarligu støðuna, har partarnir standa rættiliga langt frá hvørjum øðrum.

Serliga skuldi tað vera støddin á blokkinum, sum hevur verið til umrøðu innanhýsis í fleiri flokkum, og har er líkt til, at onkur flokkur verður noyddur at geva seg rættiliga nógv.

## Mikudagurin

Fyrsti tingfundurin við nýggja Løgtinginum verður mikudagin. Ikki bara fáa tingmenn ein nýggjan tingsal, men teir skulu eisini velja sær ein tingformann. Her kann støðan gerast nakað serligt, tí andstøðan við Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum og Miðflokkinum hevur – í øllum førum enn – eina avtalu, sum sigur, at teir standa saman í tingbólki til val av nevndum og val av tingformanni, um Anfinn Kallsberg ger av at fara í tingið við einari samgongu við sekstan tinglimum.

Hetta ger so tað, at løgmaður hevur eitt ávíst tíðartrýst á sær. Sunnukvøldið segði Anfinn Kallsberg, at hann helst vildi hava samráðingarnar lidnar til ta tíð, men hannhevði ikki sett sær nakra tíðarfreist. Hann hevði heldur ikki gjørt av, um hann fór at kalla aðrar flokkar til samráðingar, um hendan samráðingarroyndin miseydnast.



*Tað nógva av tíðini undir samráðingunum fer við at bíða og dúgliga verður eisini prátað um leyst og fast. Á myndini er kampur um gomlu sofurnar hjá Verkmannafylkingini, ið Javnaðarflokkurin fyri tað nógva nýtir.*

*Mynd: Finnur Justinussen.*

**ítróttur**

Nr. 89 • týsdagur • 14. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Dómarin viðurkendi eftir dystin:

# – Todi átti brotsspark

**Fremsti danski fótbóltsdómarin viðurkendi eftir dystin, at hann hevði gjørt eitt mistak, tá hann ikki dømdi brotsspark til FCK**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein – Parken*

Stóra samtaluevnið eftir avgerandi dystin millum FC Keypmannahavn og Brøndby sunnudagin var, um Todi Jónsson var snýttur fyri eitt ella tvey brotsspørk, tá felag hansara eftir øllum sólarmerkjum spældi av við møguleikan at vinna gull í ár.

Brøndby helt seg eisini eiga tvey brotsspørk í dystinum, men brotsspørkini, sum Todi átti, tóktust verða púra opinlýst.

– Tað er ein gøla, at hann ikki dømir brotsspark, segði ein óvanliga bersøgin Todi eftir dystin.

## Tvær ferðir

Støðurnar, tá Todi varð rendur um koll í brotsteiginum, fingu stóran týdning fyri úrslitið, og dómarin í dystinum hevði eisini ov mikið við at svara fyri seg eftir dystin.

Allir teir donsku fjølmiðlarnir vildu vita, hví hann ikki dømdi brotsspark til FCK.

Eftir at Kim Milton Nielsen, sum verður mettur sum ein tann fremsti dómarin í heiminum, hevði hvílt seg eina løtu í skiftirúminum, stillaði hann berføttur upp til nasku spurningarnar frá pressufólkunum.

Hann var kaldur, men royndi sum frægast at svara fyri seg.

## Har var brotsspark

Danska sjónvarpsrásin TV3 vísti danska dómaranum støðurnar á einum skíggja, og tá mátti Milton viðurkenna, at hann hevði gjørt eitt mistak.

Todi Jónsson var í fyrru støðunum togaður ógvusliga í troyggjuna, tá hann var komin leysur í brotsteiginum, og hann fór um koll.

– Eg sá ikki støðuna soleiðis í dystinum. Nú síggi eg, hvussu verjuspælarin heldur í troyggjuni hjá Todi, og so má siga, at har kundi eg dømt brotsspark, segði Kim Milton Nielsen.

– Tað gongur skjótt fyri seg í dystinum, og eg skal at taka røttu avgerðinar eftir lítlari løtu. Vit dómarar eru menniskju, og vit gera eisini mistøk.

## Málverjin ásannaði

Í seinnu støðuni fintaði Todi seg leysan í brotsteiginum, men var feldur av málverjanum hjá Brøndby. Frásøgumenninir hjá TV3 vóru á gosi, tá Todi helst fyri aðru ferð í dystinum var snýttur fyri brotsspark, men dómarin hevði aðra fatan – eisini eftir dystin.

– Har er ikki brotsspark. Todi sparkar sjálvur inn í armin hjá Mogens Krogh, so hann hevur sjálvur skyldina av hasum, segði Milton um tað støðuna, Men hann helt, at oftast verður dømt brotsspark í slíkum støðum.

Málverjin hjá Brøndby var heitur um oyruni, tá Todi fór um koll, og hann skilti ikki, hví dómarin ikki dømdi brotsspark.

– Eg eri spentur at síggja hasa støðuna á skíggjanum og hoyra frágreiðingina hjá Milton, tí eg raki beinini hjá Toda, og tí kundi hann lættliga havt dømt brotsspark, segði málverjin hjá Brøndby, Mogens Krogh, tá hann fór í skiftirúmið eftir dystin.

## Nógv umtala

Mánamorgunin viðgjørdu øll tey donsku bløðini brotssparksstøðurnar, og Kim Milton Nielsen og Todi Jónsson vóru høvuðspersónar í hesi viðgerð.

Myndirnar av Toda, sum verður feldur í brotsteiginum hjá Brøndby, vóru at síggja bæði í sjónvarpi og í bløðunum, og tey høvdu næstan hug til at skugga fyri vakra sigursmálinum, sum Mads Jørgensen skeyt seint í dystinum.

Todi segði við donskum fjølmiðlarnar, at hann altíð hevði havt stóra virðing fyri Milton, men at hann helt lítið um avrikið hjá dómaranum í hesum dystinum. Todi helt sjálvur, at talan var um tvey púra greið brotsspørk.



*– Tað gongur skjótt fyri seg í dystinum, og eg skal taka røttu avgerðinar eftir lítlari løtu. Vit dómarar eru menniskju, og vit gera eisini mistøk, segði Kim Milton Nielsen eftir dystin, tá hann var kringsettur av fjølmiðlafólki*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Venjarin hjá FCK:

# – Todi verður bara betri



*– Todi hevur havt fleiri skaðar, sum hava órógvað hann, men nú er hann endiliga við at koma á tað støðið, sum vit vita, at hann kann spæla á, segði Hans Backe*

**– Todi spældi væl í dag. Hann er rættiliga við at koma fyri seg aftur, og eg vænti mær nógv av honum í heyst, segði venjarin hjá FCK eftir gulldystin**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein – Parken*

Venjarin hjá FC Keypmannhavn er ein góðsligur svii, og hóast hann helt, at hansara lið átti tvey brotsspørk í stórdystinum sunnudagin, so var hann fattur sum altíð.

– Dómararnir hava tað trupult í slíkum dystum, tá alt gongur so skjótt fyri seg, og so kann tað henda, at teir ikki síggja alt. Brøndby átti kanska eitt brotspørk, men eingin ivi var um, at vit áttu tvey púra greið brotsspørk, segði Hans Backe eftir dystin.

## Todi á toppinum

Venjarin hjá FC Keypmannhavn lat í steypafinaluni hósdagin føroyska álopsmannin sita á beinkinum megin partin av tíðini, men sunnudagin var Todi við frá byrjan og spældi í meira enn 80 minuttir.

– Todi spældi væl í dag. Hann er rættiliga við at koma fyri seg aftur og kemur meira og meira við í spælið hjá okkum. Um hann verður frískur, so verður hann bara betri komandi tíðina. Eg vænti mær nógv av honum í heyst, segði Hans Backe.

– Todi hevur havt fleiri skaðar, sum hava órógvað hann, men nú er hann endiliga við at koma á tað støðið, sum vit vita, at hann kann spæla á.

## Beiskt tap

Hans Backe var keddur um javnleikin móti Brøndby, sum hevði við sær, at FCK má lata danmarksmeistaraheitið frá sær til sín argasta kappingarneyta.

– Vit spældu ein góðan dyst ímóti Brøndby. Vit høvdu fult tamarhald á dystinum so at siga allatíðina, og vit skaptu nógvar kjansir. Tí er tað beiskt, at vit missa sigurin í seinastu løtu.

– Eg eri væl nøgdur við spælið hjá okkum, men sjálvandi er tað eitt stórt vónbrot, at vit ikki vinna dystin.

– Vit vóru 10 stig aftan fyri Brøndby, tá vit byrjaðu upp á seinastu 13 dystinar. Vit hava ikki tapt í vár, so vit skaptu spenning í kappingini, men hetta kennist framvegis sum eitt stórt vónbrot júst nú, segði Hans Backe.